Úrskurður Ítróttadómstólsins

viðvíkjandi kæru frá Christian Andreasen, advokati vegna Klaksvíkar Róðrarfelag

um avgerðina hjá dómsnevndini hjá Róðrarsamband Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá Christian Andreasen, advokati vegna Klaksvíkar Róðrarfelag dagfest 25. juli 2017 um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 19. juli 2017 um, at lógin forðar ikki fyri at ymiskir bátar við sama navni, hjá sama felag rógva á ymiskum stevnum.

Í viðgerðini í Ítrótttadómstólinum hava 5 nevndarlimir luttikið: Anna Rein, formaður, Eyðhild Skaalum, næstformaður, Jóhan Lamhauge, Børge B. Hansen, og Magnus Dam, nevndarlimir.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Grundarlagi undir viðgerðini av kæruni:

- Frágreiðing frá Róðrarsambandi Føroyar
- Avrit av loyvisbrøvum
- Avrit av tilmeldinglista av bátum
- Avrit av manningarlistum
- Avrit av kunningini um at skifta um bát
- Kæra frá Christian Andreasen, advokati vegna Klaksvíkar Róðrarfelag, dagfest 25. juli 2017
- Avgerðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 19. juli 2017
- Kæra frá Klaksvíkar Róðrarfelag
- Avgerðin hjá Róðrarsamband Føroya, dagfest 11. juli 2017
- Lógir og reglur Róðrarsambands Føroya

**Málslýsing**

Í høvuðsheitinum snýr kæran seg um, at Klaksvíkar Róðrarfelag metir, at Róðrarsamband Føroya ikki hevur heimild til at geva einum báti, sum ikki rør, stig fyri úrslit, sum ein annar bátur vinnur. Klaksvíkar Róðrarfelag vísir á, at Ormurin Langi fær stig fyri úrslit, sum Ormurin/Kongurin fekk á Fjarðastevnu á Skála tann 8. juli 2017, og at er hetta ikki rætt.

Fyri Ítróttardómstólinum er upplýst og skjalprógvað, at bátarnir, ið Knørrur hevur nýtt til róðrar hjá 10-mannaførum í 2017, hava gyldugt loyvisbræv.

Róðrarfelagið Knørrur hevur við telduposti tann 13. mei 2017 tilmeldað eitt 10-mannafar við navninum Ormurin Langi, í bátastøddini 10-mannafør menn og við navninum á bátsformanninum.

Í sambandi við viðgerðina fyri dómstólinum, hevur dómsstólurin sent fyrispurning til Róðrarsambandið og fingið svar frá Róðrarsambandinum.

Soljóðandi spurningar vórðu settir Róðrarsambandi Føroya:

1. Er talan um tveir fysiskar bátar við ymiskum loyvisbrøvum sbrt. grein 2 í reglum um bát og trygd? Umframt verður Róðrasamband Føroya biðin um at senda avrit av loyvisbrøvunum.
2. Hvør av hesum bátum er tilmeldaður, annar ella báðir, sbrt. grein 1, 3 og 5 í reglum um til og frámelding? Biðið verður somuleiðis um avrit av tilmeldingarskjali/skjølum.
3. Kunnu tit greiða nærri frá mannagongdini í sambandi við umsókn/fyrispurning frá Knørra Róðrafelag at brúka gamla Ormin Langa at rógva við til Fjarðastevnu. Í skrivi tann 11. juli til Klaksvíkar Róðrafelag verður upplýst "Uppá fyrispurning fekk RK loyvi frá RSF at brúka gamla Ormin Langa at rógva við til Fjarðastevnu.". Kunnu tit greiða nærri frá hesum?
4. Kunnu tit greiða um hetta er í samsvari við galdandi praksis og í játtandi føri at greiða nærri frá hesari praksis.

Soljóðandi svar kom til ítróttardómstólin:

Vísandi til fyrispurning í telduposti frá 26. juli, hevur RSF hetta svar. Svarini eru deild í somu nummarrøð, sum fyrispurningarnir eru settir.

1. Ja. Talan er um tveir ymiskar bátar við ymiskum loyvisbrøvum. Manningin róði at byrja við við einum 10-mannafari, sum Róðrarfelagið Knørrur (RK) lat byggja í 2008 og fekk navnið Ormurin Langi. Í 2016 keypti RK eitt annað 10-mannafar frá Nordepils-Hvannasunds Róðrarfelag (NHR). Báturin kallaðist tá Norðingur. NHR keypti í umleið 2005 sama bát frá NSÍ Kappróður, sum tá æt Eysturoyingur. Praksis er, at Róðrarsamband Føroya (RSF) uppmátar ein bát, tá bátabyggjarin er so mikið liðugur at smíða, at hetta kann gerast. Tá so báturin er latin felagnum, lakkeraður og endaliga liðugtgjørdur, fær RSF boð frá felagnum, sum eigur bátin, um at koma at góðkenna bátin. Hetta er ein treyt fyri, at báturin kann luttaka í kappróðri. Felagið fær síðani eitt loyvisbræv uppá bátin. Tað er onki í reglunum hjá RSF sum áleggur keypandi ella seljandi feløgum at boða frá, um bátar skifta eigara. Ein bátur missir bara loyvisbrævið, um báturin verður broyttur frá sínum uppruna. Tá skal RSF góðkenna hann av nýggjum. Tískil er tað 10-mannafarið, sum RK nú brúkar, Eysturoyingur frá 1998. Soleiðis eitur hann í loyvisbrævinum hjá RSF, tí hann hevur framvegis sín uppruna.

2. Tá tilmelding fer fram, verður ein bátur settur á tilmeldingina. Tað er tó manningin, sum kemur at luttaka. Um felagið, har manningin rør, hevur ein annan góðkendan bát, er onki í vegin fyri, at manningin skiftir bát uttan at spyrja RSF – skilt soleiðis, at lógin áleggur ikki feløgum at boða RSF frá bátaskifti í kappingarárinum í egnum felagi. Í sambandi við tilmeldingina er tað ikki ein ítøkiligur ella ávísur bátur, sum verður tilmeldaður, men meir navnið, sum manningin fer at luttaka undir. Í dagligari talu verður – og í ein stóran mun í regluverki RSFs eisini – vendingin bátur brúkt, tá tosað verður um manningar. Hetta kann í ávísum samanhangi vera missvísandi. T.d. kann ein bátur (dreingir) fáa reytt kort og soleiðis ikki sleppa at luttaka á eini stevnu, men báturin luttekur hóast tað við gentum, tí tað var manningin, sum fekk reyða kortið.

3. RK v/Bárður Guttesen sendi skrivligan fyrispurning til Anniku Dalsgarð tann 6. juli um møguleika at skifta Ormin Langa, sum teir higartil hava brúkt, um við ein eldri Orm Langa, sum felagið RK eisini átti. Í sama fyrispurningi framgekk, at navnabrettið varð flutt yvir, og so sjálvandi eisini, at stigini í undanfarnu róðrunum eisini fylgja við. Grundgevingin fyri umbýtinum er, at tann higartil brúkti Ormurin Langi er so skeivur. Dagin eftir setti Bárður Guttesen seg um telefon í samband við RSF v/Anniku Dalsgarð og vísti til mailin. Mailurin var sendur persónliga til Anniku, og tí varð hann ikki sæddur. Annika svaraði Bárði, at ongin forðing er í lóg RSFs fyri hesum umbýti, so teir kundu býta um bát.

4. Tað er ikki óvanligt, at feløg spyrja um og velja at skifta ein bát í kappingarárinum. Vanliga orsøkin er, at fyrst brúkti báturin hevur fingið skaða ella líknandi, so hann ikki kann brúkast ella ikki kann verða klárur aftur eftir umvæling til komandi stevnu. Grundsjónarmiðið hjá Róðrarsambandi Føroya er at virka fyri, at so nógv sum gjørligt fáa møguleikan at rógva, soleiðis at tað umsitingarliga ikki eru forðingar fyri, at nakar sleppur at luttaka í kapproðri. Sum vit kenna frá øðrum ítróttargreinum, eisini róðri, eru tað manningar, sum kappast. Hetta verðu gjørt við at manningar læna útgerðina til kappingina, eisini bátar, tá tær koma til kappingar. Í Føroyum er hetta ikki líka vanligt, men RSF fær javnan fyrispurning um, at manningar hava lænt ein bát, sum tær ynskja at luttaka við. Praksisin í hesum málið er tann sami, sum RSF vanliga brúkar.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja**

Ítróttadómstólurin leggur til grund, at Róðrarfelagið Knørrur hevur nýtt tveir bátar til kappingar hjá 10-mannaførum í kappingarárinum 2017. Lagt verður somuleiðis til grund, at báðir hesir bátarnir hava gyldugt loyvisbræv til luttøku í bátastøddini 10-mannafør. Til seinast verður lagt til grund, at tilmeldingin, har Ormurin Langi er tilmeldaður, er í samsvari við grein 3 í reglunum um til- og frámelding.

Róðrarsamband Føroya hevur í skrivi til Ítróttardómstólin víst á, at tá tilmelding fer fram, verður ein bátur settur á tilmeldingina, men tað er tó manningin, sum kemur at luttaka og ikki báturin sum so. Um felagið, har manningin rør, hevur ein annan góðkendan bát, er onki i vegin fyri, at manningin skiftir bát uttan at spyrja RSF – skilt soleiðis at lógin áleggur ikki feløgunum at boða frá bátaskifti í kappingarárinum í egnum felagi. Í sambandi við tilmeldingina er tað ikki ein ítøkiligur ella ávísur bátur, sum verður tilmeldaður, men meira navnið, sum manningin fer at luttaka undir.

Sambært Róðrarsambandinum so er praksis í hesum máli tann sami, sum Róðrarsambandið vanliga brúkar.

Ítróttardómstólurin metir seg ikki hava serliga grund til at seta spurnartekn við upplýsingarnar frá Róðrarsambandinum um, hvat teirra praksis er í málum sum hesum. Ítróttardómstólurin tekur somuleiðis undir við hesum sjónarmiði hjá Róðrarsambandinum um, at tað eru manningar sum kappast. Tilmeldingin fer fram við at tilmelda ein bát við eini manning. Tað er manningin, sum er bulurin í sjálvari kappingini.

Róðrarsamband Føroya vísir á, at í dagligari talu verður vendingin bátur brúkt, tá tosað verður um manningar. Hetta kann í ávísum samanhangi vera missvísandi. Til dømis kann ein bátur (dreingir) fáa reytt kort og soleiðis ikki sleppa at luttaka á eini stevnu, men báturin luttekur hóast tað við gentum, tí tað var manningin, sum fekk reyða kortið. Ítróttardómstólurin tekur undir við hesum sjónarmiðið, eins og Ítróttardómstólurin metir, at tað er óheppið, at orðingin "bátur" í reglunum kann hava ein breiðari týdning, enn orðaljóðið leggur upp til, og

harvið elva til misskiljingar. Ítróttardómstólurin fer tí at mæla Róðrarsambandinum til at umhugsa at gera lógarverkið greiðari, soleiðis at orsøkirnar til misskiljingarnar verða beindar burtur, og samsvar verður ímillum orðaljóðið í reglunum og hvussu hetta verður umsitið í praksis.

***Avgerðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsamband Føroya verður at staðfesta.***

**Úrskurður**

Grundað á frammanfyri standandi, og at grundarlag er ikki undir kærupunktinum um tveir tilmeldaðar bátar og, at Ítróttadómstólurin tekur undir við tí, sum Róðrarsamband Føroya vísir á, at ein tilmeldaður bátur er at rokna sum ein tilmeldað manning, og einki er í reglunum, sum sigur, at tað ikki ber til at skifta bát - bert manningin er tann sama, og báturin/manningin annars fylgir reglunum um manning, samtykti Ítróttadómstólurin at staðfesta avgerðina hjá Dómsnevnd Róðrarsambands Føroya um, at lógin forðar ikki fyri, at ymiskir bátar við sama navni hjá sama felag rógva á ymiskum stevnum.

Tórshavn 31. August 2017

Anna Rein    Eyðhild Skaalum    Jóhan Lamhauge

Børge B. Hansen    Magnus Dam